
Skifti
2023

# Mistela og hennara íblástur á Eiði



SKIFTI 2023

# Úr skránni fyri Skifti 2023
# Mistela og hennara íblástur á Eiði

Ein framsýning er allar dagarnar við málningum og list hjá Sigrun Gunnarsdóttir, Ellindi Egilstrøð og Onnu Sofíu Egilstrøð. Harafturat verður ein installatión, við íblástri frá Elizabeth Taylor.

**Opið er soleiðis:**

Hóskvøldið 16. november frá kl. 18 til 22.
Fríggjadagin 17. november frá kl. 14 til 22.
Leygardagin 18. november frá kl. 12 til 20.
Sunnudagin 19. november frá kl. 14 til 18.

**Skráin fyri tiltakið:**

Hóskvøldið 16.november kl. 19 setir Annsy Høghamar, borgarstjóri tiltakið og Lis Mortensen greiðir frá um Elizabeth Taylor. Anna Katrin Øssursdóttir Egilstrøð framførður. Aftaná verður filmurin Heartist um Sigrun Gunnarsdóttir sýndur fram.

Fríggjakvøldið 17. november kl. 20 er tað Dansifelagið á Látrinum, ið greiðir frá um føroyskan dans á Eiði, og farið verður uppá gólv.

Leygardagin 18. november kl. 10 er borgaraverkstova um mentan og list á Eiði, og kl. 14 spælir Eiðis Ljómfelag. Klokkan 20:00 er konsert við Marjun Wolles.

Framsýningin og installatiónin er allar dagarnar, tá opið er, og tað ber til at fáa ein kaffimun og bert sita og njóta løtuna í Kolshøll.

Fyriskiparar av tiltakinum eru Anna Sofía og Ellindur Egilstrøð.

# Skifti

*Listafólk nýta ofta náttúruna, á einhvønn hátt, í teirra listarliga arbeiði. Ofta er náttúran nýtt í metaforum, ella myndamáli, ið kunnu tulkast á ymiskan hátt. Bæði í myndlist, sálmum og sangum hevur hetta verið vanligt, og ofta eru hesir metaforar eitthvørt djúpari filosofiskt.*

*Møguliga geva hesir metaforar fleiri spurningar enn svar og nakað at reflektera yvir. Tað er ikki eintýðugt, hvat hesir metaforar merkja, men teir eru upp til okkara egnu upplivilsi og tulking.*

*Við hesum tiltakinum vilja vit arbeiða við hvussu ymisk skifti ávirka okkara lív og geva okkum íblástur. Vit geva møguleika fyri at steðga á eina løtu, undrast, verða spyrjandi og reflektera yvir tað upplivilsið, ið vit fáa. Eitt skifti hevur verið nýtt í mongum ymiskum mentanum í øldir sum ein metaforur ella mynd uppá nakað djúpari, ið vit kunnu reflektera um. Tað kunnu vera skifti, ið vit onga ávirkan hava á, og skifti, ið vit sjálvi kunnu hava ávirkan á.*



## Innihaldsyvirlit
## Úr skránni fyri Skifti 2023


| | Síða |
|---|---|
| Skifti, Ellindur Egilstrøð | 4 |
| Mistela og íblásturin, hon gav á Eiði, Birgir Kruse | 7 |
| Góðu eiðisfólk! Góðu gestir! Annsy Høghamar, borgarstjór | 9 |
| Brøvini av Eiði, sum endaðu í Minnesota, Lis E. Mortensen | 13 |
| Eg sat har á hægsta tindi, Óli Egilstrøð og Anna Katrin Øssursdóttir Egilstrøð | 25 |
| 30. januar 1916, Alda Magnusardóttir Egilstrøð | 26 |
| Hjartafilmur á Eiði, Birgir Kruse | 29 |
| Dansifelagið á Látrinum, Rasmus Joensen | 40 |
| Borgaraverkstova, Jóannes Norðberg Egilstrøð | 65 |
| Stjørnuløtur - Kærleikin gloymir ei, Marjun Wolles | 68 |
| Eiðs Ljómfelag, Kári Sólstein | 70 |
| Málningur úr Herning og ynski um savn, Ellindur Egilstrøð | 72 |
| Heilsan frá Birgir Kruse til Annsy Høghamar, borgarstjóra, Birgir Kruse | 73 |
| Uppskot frá Jógvan K. Mørkøre um mentanarhús á vaglinum á Eiði, Jógvan K. Mørkøre | 74 |
| Mín íblástur, Ellindur Egilstrøð | 77 |
| Langtidsturist her i landet, Jan Egil Kristiansen | 83 |
| Luttakarar | 85 |
| Stuðlar | 85 |
| Myndarøð, Kateryna Vischchak Joensen | 86 |

***Í føroysku náttúruni eru skiftini mong og títt. Tað er ikki ókent, at í Føroyum kunnu vit hava allar fýra árstíðinar sama dag.***



*Tá vit koyra inn í ein av tunnlunum, kann veðrið verða nakað heilt annað, enn tá vit koma út aftur í hinum endanum, ella vit koma um eitt skarð.*

Sagt verður, at føroyingar hava 40 orð fyri mjørka. Um tað er so ella ikki, hevur ikki avgerandi týdning, men $H_2O$, ella vatn, broytist nógv.

Stundum er tað regn, síðani mjørki, ella møguliga kavi, og sløgini av kava eru mong. Møguliga tað, ið einaferð var kavi, frystir til ís og síðani aftur tiðnar til vatn og gerst ein áarløkur ella nakað heilt annað.

Soleiðis er tað eisini í málningunum, sangunum og listini sum heild. Eitt regnæl kann broytast, bæði til eitt kavaæl, mjørka, ella nakað heilt annað, alt eftir hvat ljós kemur á ella upplivilsið hjá upplivaranum júst tá.

# Mistela og íblásturin, hon gav á Eiði

## Orð og myndir Birgir Kruse

Ein dag í juni 1895 leggur DFDS skipið Laura at í Føroyum. Ferðamannaskipið skal til Íslands og umborð er 39 ára gamla amerikanska Elizabeth Taylor. Hon er ein traveling lady, sum skrivar til bløð í New York og Boston.

Nú fer hon til Íslands at skriva um æður.

Hon hevur ferðast víða. Hevur verið á listaskúla í New York og í París. Hevur fiskað laks í Alaska, og ferðast eftir stóru áunum í Kanada. Í 1890 var hon fyrstu ferð í Evropa, og vitjaði í Onglandi, Skotlandi, Noregi, Fraklandi, Montenegro og Italia.



*Elizabeth Taylor, Mistela* (1856-1932)

Tá Elizabeth hendan junidag í 1895 stendur á dekkinum á Lauru, er mjørki. Bráddliga koma Føroyar úr tí hulda. Tað er okkurt sjáldsamt, ið hugtekur hana, og hon veit, at her fer hon at vitja aftur.

Fimm ferðir kemur Elizabeth aftur til Føroya. Hon er tilsamans tíggju ár í Føroyum, mest á Eiði, í Miðvági og á Viðareiði. Tá hon er á Eiði, gistir hon hjá Caroline Amalie og Jens Jørgen Kruse, ið eru foreldur at Niels Kruse.
Hann er fimtan ár yngri enn Elizabeth.

Millum fólk verður hon kallað Miss Taylor, sum skjótt verður til Mistela, við longum é.

Hon teknar, málar og skrivar greinar til amerikansk tíðarrit sum Frank Leslie's Popular Monthly, Atlantic Monthly og Forest and Stream. Greinarnar fíggja ferðirnar og uppihaldið.

Niels Kruse og Elizabeth hava felags áhugamál, sum er at tekna og mála. Elizabeth hevur jú fingið undirvísing á listaskúlum í New York og í París, og hon kann tí geva bæði íblástur og vitan.

Undir fyrra veraldarbardaga býr hon øll árini, frá 1914 til 1919, á kvistinum hjá Mallu (Amalie), ið er systir Niels Kruse og Oliver Øster, og dóttir Jens Jørgen Kruse og Caroline Amalie. Hesi árini eru lýst í Five Years in a Faroe Attic, eisini tá sonur teirra, Óli Egilstrøð (Øster), ið hevur verið virkin at tekna og mála, varð føddur.

Niels Kruse, var fyrsti føroyingur at fáa málning við á várframsýningina á Charlottenborg, og Niels Kruse er abbi Sigrun Gunnarsdóttir, sum júst í hesum døgum verður lýst í heimildarfilminum Heartist, ið ferðast víða, og hevur fingið óvanliga góð skoðsmál.

***Tiltakið um íblásturin frá Elizabeth Taylor byrjar hósdagin 16. november í Kolshøll á Eiði. Tá verður filmurin Heartist eisini vístur.***

***Ellindur og Anna Sofía Egilstrøð skipa fyri tiltakinum, sum hevur afturvendandi heitið Skifti.***

# Góðu eiðisfólk! Góðu gestir!

## Annsy Høghamar, borgarstjóri

Aftur í ár kunnu vit her í Kolshøll gleðast um Skifti, sum vikuna út varpar ljós á mentanarlívið og listafólk við tilknýti til Eiðis.
Vit koma at síggja mangt og hvat, ið verður víst fram, og serligt fyri ársins útgávu av Skifti er yvirskriftin: “*Mistela og hennara íblástur á Eiði*”.




*Annsy Høghamar, borgarstjóri*

***Júst hetta navnið, Mistela, er ikki ókent fyri okkum, sum gott og væl eru tilkomin ella eldri enn tað.***

***Eg rokni við, at tey flestu hava hoyrt um hana, og sjálv minnist eg meg eisini at hava hoyrt okkurt um hana.***

Birgir Kruse skrivaði nú um dagarnar, at hon var í Føroyum fimm ferðir – mest á Eiði, í Miðvági og á Viðareiði – og at hon tilsamans búði í Føroyum í eini tíggju ár.

Hetta var fyri góðum hundrað árum síðani, og alt tað koma vit at hoyra meira um um eina løtu.


Kolshøll







Eg vil tó nevna, at allan fyrra heimsbardaga var Mistela her, og tá búði hon á kvistinum hjá Mallu, ið var systir Niels Kruse og var gift við Oliver Øster.

Her kann til stuttleika nevnast, at Niels Kruse var abbi Sigruna Gunnarsdóttir, ið sýnir list fram her, men eisini er aktuell við filminum "The Heartist".

Niels Kruse var eisini ommubeiggi systkini bæði, Ellind og Annu Sofíu Egilstrøð, ið sýna fram her hesar dagarnar.



Pápi teirra var forrestin marglistamaðurin, Óli Egilstrøð, so listin lýsir sum ein reyður tráður í ættarbondunum millum øll hesi.

**Endamálið við Skifti er at fáa fram mentanina her í bygdini, tí hóast kanska øll ikki hava verið so sjónlig, eru tað ikki so fá listafólk, Eiðisbygd hevur fostrað millum ár og dag.**

Felags fyri flestu teirra hevur verið, at tey hava verið í so beskeðin og kanska heldur ikki sjálv hava sæð, hvussu dýrabærur tann listarligi skattur hevur verið, ið tey hava latið eftir seg.

Nú hava vit so ein møguleika at lyfta tað fram í ljósið, ið kanska ofta hevur verið dult ella lítil umrøtt, so tað nú kann vera okkum øllum til miklan íblástur og stóra gleði. Vónandi kunnu hesir dagar virka til, at talentirnar ikki verða grivnar niður, men tiknar fram og brúktar, tí so er nógv vunnið.



***Vit, sum varða av Eiðis kommunu, eru takksom fyri, at tit bæði, Ellindur og Anna Sofía, hava tikið stig til tað frálíka tiltak, ið vit mugu siga, at Skifti er.***
***Takk skulu tit hava fyri tað.***

Ikki minst er tað hugaligt at síggja, hvussu Kolshøll kann vera karmur um mentan á høgum stigi, ið vit øll kunnu fáa stóra gleði av. Umframt málningar og list, verður eisini ein installatión, sum er gjørd við íblástri frá Elizabeth Taylor.

Dansifelagið á Látrinum, ein Borgaraverkstova um mentan og list á Eiði, og tónleikur frá Eiðis Ljómfelag eru eisini á skránni hesar dagarnar.

Snøgt sagt ein vifta av fjølbroyttari list og mentan, vit bara kunnu fegnast um og gleða okkum til at njóta.
Við hesum orðum vil eg seta Skifti 2023.
Takk fyri!

*Annsy Høghamar, borgarstjóri í Eiðis kommunu.*



Lis Mortensen, 1977 - 1978

# BRØVINI AV EIÐI, SUM ENDAÐU Í MINNESOTA




Stillwater, Minnesota

**Amerikanska kvinnan Elizabeth Taylor, rithøvundur og málari, vitjaði í Føroyum í long tíðarskeið fyrst í 1900-talinum. Hon búði á Eiði undir fyrra heimsbardaga og skrivaði hugtakandi søgur úr samtíðini. Brævaskifti hennara við eiðisfólk og aðrar føroyingar vóru grundarlag fyri einum merkisverdum seinnaparti í Minnesota hjá blaðungari gentu úr Føroyum nógv nógv ár seinni.**

Ein av síðstu døgunum í mars mánað skrivaði Ellindur til mín og spurdi til eina løgna søgu frá 1978, sum eg einaferð hevði greitt frá. Hann spurdi, um eg hevði hug at koma ein túr til Eiðis at siga hesa søgu í november í sambandi við mentanartiltak í Kolshøll.

Søgan frá 1978 snýr seg um nøkur brøv úr Føroyum, sum í dag eru varðveitt í Minnesota í USA. Søgan nemur við kvinnuna, sum fekk brøvini, og føroyingarnir, sum skrivaðu til hana fyri meira enn 100 árum síðan.

Í 1977, tá ið eg var 17 ára gomul, fekk eg møguleika at fara til USA í eitt ár sum AFS-skiftisnæmingur. Eg kom at búgva hjá eini familju, Ray og Ceci Rath, sum búðu nærhendis lítla býin Stillwater í Minnesota.

Býurin var eins lítil og Havnin, og heimsatlassið heima hjá okkum vísti ikki so smá støð úti í heimi. “Stillwater. Handan býin kenni eg gott”, segði mamma mín. Vit vóru øll bilsin og spurdu: “Hvussu ber tað til, at tú kennir hesa lítlu flekkuna?”

Pápi mín hevði verið sjómaður og siglt úti í verðini sum stýrimaður hjá ØK, meðan mamma ikki hevði ferðast nakað serligt. “Jú”, segði mamma, “eg kenni handan býin frá skaldsøguni Nybyggerne hjá Wilhelm Moberg”.

Bøkurnar og sjónvarpsrøðin vóru nýliga komnar til Føroyar, og mamma var, eins og nógvir aðrir føroyingar, heilt burtur í tí hørðu lagnusøguni hjá teim fátæku tilflytarunum úr Skåne.

# Skjøl og list hjá Elizabeth Taylor á Minnesota Historical Society



*Dagbók hjá Elizabeth Taylor 1901*



*Dagbók 1905*

“Tað var Stillwater, sum Karl Oskar og Kristina komu til, tá ið tey emigreraðu úr Svøríki til USA mitt í 1800 talinum”, greiddi mamma frá. Eg kom at búgva stutt uttanfyri Stillwater og upplivdi mangan, at arvurin úr Europa og forvitnið um onnur lond fylti nógv millum fólk. Javnan varð eg boðin út til klubbar og tiltøk at greiða frá um Føroyar og vísa myndir, og javnan var onkur stubbi skrivaður í teirra Dimmalætting, sum kallaðist Stillwater Gazette.

Bløðini við hesum tíðindastubbum endaðu hjá einum haldara í Texas, James Taylor Dunn, sum var ættaður úr Minnesota.

Um várið 1978 fekk eg bræv frá James Taylor Dunn, sum hevði lisið í Stillwater Gazette, at eg var skiftisnæmingur úr Føroyum. Hann fyrireikaði ferð til Føroyar at gera kanningar um eina skyldkonu, sum hevði verið í Føroyum í fleiri ár um 1900-talið. Um nakrar vikur komu hann og konan ein túr til heimbýin í Minnesota, og hann spurdi, um vit kundu hittast.

Hann hevði nøkur donsk brøv og spurdi, um eg kundi umseta tey fyri seg. Hann var í ferð við at skriva eina bók um skyldkonu sína, Elizabeth Taylor, sum ferðaðist til Føroyar fleiri ferðir.

James Taylor Dunn og eg hittust ein dag í mai og koyrdu út til summarhús teirra við ánna Saint Croix stutt norðanfyri Stillwater.

Veðrið var gott, og konan og hann vóru gestablíð. Vit sótu og práttaðu úti í gamla havanum undir skugganum av teimum krókutu trøunum, sum hingu yvir ánna.

James greiddi frá tantu síni, Elizabeth Taylor, sum eg ongantíð hevði hoyrt um fyrr. Hann greiddi frá, at hon lærdi málningalist í London og Paris og ferðaðist í mong ár til eitt nú Kanada, Noreg og Ísland.




## Samrøða við James Taylor Dunn



*James Taylor Dunn*



Sincerely yours,

JAMES TAYLOR DUNN

Elizabeth livdi av at selja ferðasøgur til ymisk altjóða tíðarrit. Á eini ferð til Íslands gjørdist hon serliga hugtikin av Føroyum, og vitjaði aftur fleiri ferð í tíðarskeiðum frá 1890unum til umleið 1920. Tá ið fyrri heimsbardagi brast á, var hon stødd í Føroyum og slapp ikki av landinum aftur fyrrenn fleiri ár seinni, tá ið kríggið endaði. Hesi árini leigaði hon sær kamar á Eiði og kom á henda hátt at kenna Eiðisbygd og fólkini har sera væl. Eftir kríggið flutti Elizabeth Taylor úr Føroyum til Vermont í USA at búgva.

Eftir kríggið flutti Elizabeth Taylor úr Føroyum til Vermont í USA at búgva. Har lat hon byggja eini smá fittlig hús, har hon búði, til hon doyði í 1932. James Taylor Dunn, sum vaks upp í Minnesota, var ungur maður tá og gjørdist áhugaður í serstøku søgum hennara. Hann var á veg til Vermont at vitja hana, men gjørdist ov seinur, tí hon doyði innan eftir stutta sjúkralegu.



Lutir hjá Elizabeth, bæði pappír og málningar, endaðu hjá familjuni Taylor Dunn í Minnesota, og James fekk tá góðar møguleikar at arbeiða við hesum tilfari. Hann arbeiddi í mong ár við at skriva eina bók um hana.

Í pappírsrúgvuni fann hann dagbøkur, notubøkur og brævaskiftið, sum Elizabeth hevði við fleiri fólk í Føroyum í tíðini fyrst í 1900 til 1920'ini. Brøvini vóru skrivaði á donskum, men tey dugdi James ikki at lesa, og tað vóru nøkur av hesum brøvunum, sum hann vildi hava meg at týða hendan góðveðursdagin í 1978.

Brøvini lógu í eini kartotekseskju, og James blaðaði og leitaði eftir nøkrum ávísum brøvum, sum eg skuldi týða. Hetta gjørdist av sonnum ein minnisverdur seinnapartur fyri eina unga 17 ára gamla gentu úr Føroyum.

Nøkur av brøvunum vóru frá Jacob Jakobsen, doktara, sum skrivaði Færøske folkesagn og æventyr. Í brævinum greiddi hann frá ymsum, sum tað tyktist, at Elizabeth hevði spurt hann um. Eg minnist ikki ítøkiligu evnini, sum vóru lýst í brævinum, annað enn at tónin var fólkaligur og formellur.

***Eg hevði hoyrt nógv um Jacob Jakobsen frá míni egnu skúlagongd og var bilsin av at lesa hesi brøv frá honum til Elizabeth Taylor.***

***Enn meir bilsin varð eg av tí næsta brævinum, sum eg fekk í hondina.***

***Hetta var eitt bræv frá Mikkjali á Ryggi. Tónin í brævinum var meira óformellur og vinarligur. Mikkjal greiddi frá ymsum, sum var hent seinastu tíðina, um fólk, sum tey bæði kendu, og um veður og vind. Síðan takkaði hann Elizabeth fyri, at hon hevði víst honum, hvussu ein málar skýggj.***

Dimmalætting 15.juni 1978

## Bók um Elisabeth Taylor

**Amerikanskur ættarmaður í Føroyum og vitjar**

Eingilsk kvinna, Elisabeth Taylor, dvaldi í tilsamans 10 ár í Føroyum fram til 1919. Hon fekst við at mála (vatnmálningar) og skriva, og var annars á mangan hátt eitt sjaldsama dámligt fólk. Hon doyði í 1932.

Ein ættarmaður hennara (hon var ommusystir hansara), sum knýttur er at Minnesota Historical Society, er í hesum døgum í Føroyum og vitjar fyri at hitta fólk, sum hava havt samband við hana, ta tíð, ið miss Taylor, sum hon vanliga varð kallað, var í Føroyum og sum kanska eiga myndir eftir hana ella vita okkurt frá henni at siga, sum hann ikki veit framman undan.

James Taylor Dunn hevur longu, síðani hann kom higar mánadagin, verið í samband við fólk ymsastaðir í landinum og í gjár fór hann norður til Eiðis, har ommusystir hansara ein stóran part av tíðini í Føroyum helt til. Ætlanin er at brúka ein part av hesum tilfari til eina bók, hann eru í ferð við at skriva um hana og tað, sum hon í skrift og málningum hevur lagt eftir seg.

Annars verður hann at hitta á hotel Hafnia til sunnudagin, tá ið hann heldur leiðina til Luxembourg, har familja hansara heldur summarfrí. Um onkur skuldi komið eftir nakað at siga honum frá eftir fráfaringardagin, man bera til at venda sær til Paula Hansen, Føgrulíð 11 (tlf. 13732), sum hevur verið fremsti kontaktmaður hansara undir Føroyavitjanini.



James Taylor Dunn, Research Associat 2, Minnesota Historical Society.

Og hann endaði brævið við at skriva nakað soleiðis: “nu mangler jeg blå maling. Tror du, at du har mulighed for at sende mig mere maling? Det ville jeg være meget taknemlig for”. Eg var hugtikin av at sita í góðveðrinum í hesum vakra gamla urtagarðinum í Minnesota og lesa eitt bræv frá einum, sum eg hevði hoyrt so nógv um ígjøgnum alla skúlagongdina.
Tey brøvini, sum hugtóku meg mest, vóru ein røð av brøvum frá Niels Kruse á Eiði.

***Í tí fyrsta brævinum greiddi Niels frá ymiskum úr bygdini. Tónin var vinarligur, men álvarsamur og tungur. Hetta hevði verið ein strævin tíð við ringum veðri. Hann greiddi frá familjuni og fólkum, sum tey bæði kendu. Og hann greiddi frá, at tað var tungt at reka keypmanshandil í hesum tíðum. Tað var ringt at fáa endarnar at røkka.***

Í tí næsta brævinum er tónin ein heilt annar. Lagið er gott, og brævið osar av lívsgleði. Veðrið er gott, og familjan hevur tað gott. Hann greiðir frá, at nú ein dagin fekk hann vitjan av ongum minni enn kapteyni Born, sum legði inn á Eiði við skipi sínum. Kapteyn Born og Niels prátaðu. Niels vísti honum nakrar málningar, og kapteyn Born bleiv so hugtikin, at hann bjóðaði sær til at taka ein málning við sær til Danmarkar og royna at fáa hann upptiknan til framsýning á Charlottenborg gallaríi í Keypmannahavn.

Tað triðja brævið kom, og lagið var ringt. Nú hevði Niels Kruse aftur fingið bræv frá kapteyn Born. Boðini vóru einki stuttlig. Tað hevði ikki eydnast Born at fáa málningin inn á Charlottenborg framsýningina, tíverri. Alt var ringt, veðrið var myrkt, handilin gekk illa, tað var ringt at fáa endar at røkka.




Fáar dagar seinni kom enn eitt bræv til Elizabeth frá Niels Kruse. Hann var so findarglaður og lætthugaður. Eg ørminnist, at hann skrivaði nakað soleiðis: "Nú havi eg góð boð til tín í dag. Eg havi akkurát fingið bræv frá Kapteyn Born. Hann kom við teim allarbestu tíðindunum. Hann sigur, at nú verður málningurin kortini sýndur fram á framsýningini á Charlottenborg. Endiliga hendir okkurt gott, og eg eri spentur. Nú er vón fyri framman! Annars gongur alt væl her, og øll lata heilsa."

Tað at síggja hesi brøv og lesa tey var hugtakandi og hjartanemandi. Hetta fór ongantíð frá mær aftur, hóast tað í ár eru 45 ár liðin síðan hendan seinnapartin í 1978 úti í havanum hjá James Taylor Dunn undir teim gomlu krókutu trøunum við ánna Saint Croix.

***Stutta tíð seinni fóru James Taylor Dunn og kona hansara til Føroyar at vitja. Foreldur míni hjálptu honum alt tað, sum tey vóru ment fyri at finna upplýsingar, søgur og fólk, sum mintust Elizabeth Taylor. Tey koyrdu til Eiðis og aðrar bygdir og tosaðu við fólk. Ein lýsing varð sett í bløðini við úrdrátti av søguni og eini áheitan, um segði: "Um nakar minnist Elizabeth Taylor, vinaliga ring til Paula Hansen, tlf 13732".***

Tað vísti seg, at fleiri mintust Elizabeth og gjørdu vart við seg á henda hátt. Og smílið kom eisini, tí Hollywood-filmstjørnan við sama navnið var nógv frammi hesi árini. Pápi mín var havnafúti hjá Tórshavnar havn, og tann dagin, ið hann kom til arbeiðis eftir lýsingina í Dimmalætting, komu menn á kaiini at forvitnast: "*Pauli, tú lýsir eftir fólki, sum kenna Elizabeth Taylor? Álvara?*"

Tað fyrsta handritið hjá James Taylor Dunn um skyldkonu sína kallaðist "Elizabeth and the Far Islands: Ten Years on the Faroe Islands". Hann royndi í fleiri ár at fáa avtalu um bókaprent, men tað eydnaðist ikki. Í 1987 gav hann upp og sendi ístaðin avrit av handritinum til Føroyar. Landsbókasavnið fekk upprunaeintakið av handritinum, og pápi mín fekk eitt innbundið eintak. Eitt handrit mundi eisini verða sent til Eiðis, hugsi eg.

Eina tíð seinni varð handritið umskrivað, soleiðis at tað kom at snúgva seg um ferðafrásagnir hjá Elizabeth Taylor í mongum londum, og hesa ferð eydnaðist at finna eitt forlag, sum vildi geva út.

Bókin fekk heitið The Far Islands and other cold places: Travel Essays of a Victorian Lady bleiv útgivin í 1997.

Tá ið eg fyrireikaði meg at siga hesa søguna til mentanartiltakið á Eiði, fann eg eina samrøðu á alnótini við James Taylor Dunn. Eini 20 minuttir inni í samrøðuni greiðir hann frá um Elizabeth Taylor:

*https://collection.mndigital.org/catalog/p16022coll38:166#?c=&m=&s=&cv=*

***Skjøl og list hjá Elizabeth Taylor, sum hon legði eftir seg í Vermont, komu í góðar hendur í Minnesota. Bæði James Taylor Dunn og pápi hansara vóru bókavørðir, og hóast tilfarið ikki er teldutøkt enn, er tað væl skipað á goymslu hjá Minnesota Historical Society, sum partur av savni við heitinum James Taylor Dunn and Family Papers.***

***Fyri nøkrum árum síðan royndi eg til stuttleikar at koma í samband við Minnesota Historical Society og lána hesi brøv, sum vóru send til Elizabeth Taylor. Tað bar ikki til, fekk eg at vita, tí tey høvdu ikki møguleika at senda uppruna tilfar eitt nú til Landsbókasavnið ella Landsskjalasavnið. Men eg kundi biða um at fáa síður skannaðar og á henda hátt síggja eitthvørt.***

Útfrá listanum, sum eg fekk, bað eg um nakrar síður úr dagbókum og notubókum. Hetta tilfarið var áhugavert at síggja, men tó ikki so lætt at lesa. Av áhuga er tó at leggja til merkis, at tær elstu notubøkurnar eru á enskum og tær yngru á donskum.

Tað hevði verið stuttligt at sæð tey umrøddu brøvini aftur. Kanska onkur hevur møguleika at vitja í Minnesota og gjøgnumganga arkiv-kassarnar hjá Elizabeth Taylor? Her er ivaleyst nógv at finna um hesa merkisverdu kvinnu. Munnu nøkur brøv frá henni enn finnast á Eiði?

Hetta er frágreiðingin, soleiðis sum eg minnist hana, um nøkur brøv av Eiði, sum endaðu í Minnesota, og sum eg, einans 17 ára gomul, slapp at lesa ein seinnapart fyri 45 árum síðan.

Brøvini góvu eitt vindeyga inn í eina søgu, sum hevur hugtikið meg líka síðan. Søgan um ta amerikansku kvinnuna, Elizabeth Taylor, sum skrivaði til altjóða tíðarrit um føroysku samtíðina fyrst í 1900-talinum á ein hátt, sum eingin annar gjørdi. Søgurnar eru sjáldsamar og áhugaverdar, tí hon var í Føroyum so leingi og sum kvinna hevði hon eyga fyri lívinum hjá føroyskum kvinnum. Elizabeth var rithøvundur við útbúgving innan málningalist og við stórum alski til havabrúk. Innan øll hesi øki var hon virkin og gav íblástur til føroyingar. Hetta var ein íblástur, sum á Eiði røkkur heilt fram í okkara tíð.

Við hesi lítlu søgu ynski eg tykkum allarbestu eydnu við hugtakandi tiltakinum um Mistelu, sum eiðisfólk kallaðu hana.

# EG SAT HAR Á HÆGSTA TINDI

Anna Katrin Øssursdóttir Egilstrøð sang sangin hjá abba sínum til tiltakið.



*Anna Katrin Øssursdóttir Egilstrøð*

**Í 1996 yrkti Óli Egilstrøð hendan sangin, ið vit kunnu reflektera yvir;**
**Á finskum: Kesäpäivä Kangasalla.**
**Úr svenskum til danskt Zacharias Topelius.**
**Kangasalasang: ”Jag gungar i høgsta grenen”.**
**Eftir P.J. Hannikainen.**
**Á føroyskum Óli Egilstrøð.**

*Eg sat har á hægsta tindi
av brattastu ups eg fleyg,
tá sá eg landið alfagurt
sum nýføtt úr havinum steig.
Og morgunroðan tað kysti,
so yndisligt var tað at sjá.
Tær blánandi oyggjar, tær
fjaru,
tær lógu í silvitnisbrá.*

*Sum havdýpið blá tíni eygu,
sum kelduvatnið so rein,
og bylgjunar við tínar
strendur
so eymliga kíndu hvønn stein.
Og hundraðtals drangar
reystir,
teir randa tín fjálga barm.
Tær døggvátu, græsgrønu
líðir,
alt fevndi tú við tín arm.*

*Eg bert ein smáfuglur eri,
mítt veingjaspenn er so stutt;
Men var eg á arnarveingjum,
tá fleyg eg í loftið upp.
Tá fleyg og fleyg eg so víða
heilt upp til Guds himnasól
og setti meg har at hvíla
og syngja um summar og sól.*

*Tú heilagi himnanna Harri
vælsignaður hoyr mína bøn,
tak hond um alt skaparverkið,
læt grønkast hvønn teig á jørð
og lær okkum so at semjast
og kynda ein kærleiksbrand.
Og Harri lær meg at elska
og lær meg at elska mítt land.*

Óli Egilstrøð 1996.




*Alda Magnusardóttir Egilstrøð týddi brævið, ið Elizabeth Taylor skrivaði til Helen 30. januar 1916 til hátíðarhaldið tá Óli Egilstrøð, abbi Aldu, hevði verið 100 ár 13. januar 2016. Anna Katrin Øssursdóttir Egilstrøð læs hesa tíðingina upp til tiltakið Skifti í 2023.*


The
Far Islands
and
Other Cold Places
Travel Essays
of a Victorian Lady
Elizabeth Taylor

# The Far Islands and other Cold Places

*30. januar 1916*

Góða Helen,

Í einum brævið eg fekk sendandi úr Amerika, sigur hon, at hon sær fyri sær at eg "droymi meg burtur frá friðsælum døgum, langt burtur frá ruðuleika og órógvi." Eg fari her at greiða frá einum av mínum "friðsælu døgum."

Vit vistu longu á middegi at stormurin fór at raka okkum við harðari hond. Sjógvurin hevði ongan frið á sær, skúmið dró um flesjarnar og veksandi vindurin greiddi suðandi frá, at øgiligt ódnaveður var ávegis. Myrkrið hevði lagt seg tíðliga og klokkan fýra hevði ódnarveðrið last seg um okkum norðan ífrá. Húsini skulvu, grenjaðu og spentust sum eitt skip í havsneyð. Eitt grovt heglingsæl og tjúkt sjórok kom úr norðri - vatnrætt ígjøgnum luftina áðrenn tað rakti húsini, ið vóru díktu undir soleiðis at hvør sprekka og hvør rók fyltist. Undir væðingini, í tí ráliga skápinum, grulvaðu eg og Josefine á øllum fýra við oljulampum. Ímeðan, fann omma fram sekkir og tvøgur, spannir og baljur. Á kvistinum, við tí tunna sink takinum og tvíbjálkaðu veggjunum, larmaði so nógv at vit máttu rópa fyri at hoyra hvønn annan. Men hóast ta, so hoyrdist eitt ýl fram um onnur - ýlið frá einum menniskja.

Ímeðan tær harðastu hvirlurnar enn leikaðu, sprettist ein sjáldsom sissandi løta, sum um at eitt hvørt hendi ið tók tingdarkraftina úr rúminum. Tað var ovfarandi at missa alla kenslu av tyngd og støðufesti, samtíðis við at hava kensluna av at kvisturin var um at vera tikin av hvirlunum, sum eitt neyðarsligt sett av kortum. Náttin tók ongan enda, og vit vóru enn vísar í, at takið fór at fara á flog og húsini vóru tikin av grundini, og hvat vildi Amalya tá gjørt? Tí á hesi óttafullu nátt, var Óli, lítli sonur Amalyu føddur. Eg hevði hann í míni vernd, fimm minuttir gamal, - so bláur og kaldur, - eg helt honum tætt, ballaðan í mítt reyða skjúrt. Ímeðan stóðu vindeygakarmarnir á tambi, og gardinurnar flákraðu í teimum rím klæddu gluggunum. Oh, neyðars lítli maður - at koma í heimin á eini slíkari nátt!



# HJARTAFILMUR Á EIÐI

### Orð og myndir Birgir Kruse

Heimildarfilmurin Heartist er ein skaldaborin og estetiskt gjøgnumførd myndalýsing av listakvinnuni Sigrun Gunnarsdóttir, sum býr á Eiði.

Eg avmyndaði hana í Kolshøll í skúlanum á Eiði í gjár, har filmurin varð frumsýndur og Ansy Høghamar, virkandi borgarstjóri, bar fram eina heilsan frá kommununi, innan Sigrun sjálv innleiddi og greiddi frá, hvussu hon fekk hug at mála og at hyggja eftir filmi.











Tá Sigrun tíðliga í filminum, sum varir ein knappan tíma, kemur inn í gongina, er ein fotomynd av mammuni fyri endanum.

Hon snarar inn í køkin, og vit síggja mammuna og hendurnar.

Tá er tað, sum um faldaðu móðurhendurnar eksplodera, soleiðis filmiskt í frásøgnini, har vit einu løtuna eru í barnaheiminum yviri í Gjógv, og so fara við førninginum frá mammuni niðan í Koll, har Sigrun nú býr, og málar á Hvítakletsvegi.



Ein av mest hugtakandi lyklasenunum er, tá hon sær Slættaratind og málar á glas, sum var tað køksgluggin, og einu løtuna steðgar og undrast, tá ein sprekka verður í fjallinum.

Ein íbygd surrealisma er í tí naivistiska, sum hon sigur, at lýsa seg sjálva. Hon er naivist og surrealist.

Og beint sum eg eri hugtikin av ítøkiligu filmisku sprekkuni í fjallasøguni, fara smálutirnir í málningunum, fuglarnir, børnini og krossarnir úr køkinum yviri í Gjógv á flog sum animatiónir og liva teirra egna lív í skaldaborna og estetiskt væl gjøgnumugsaða heimildarfilminum, Heartist.

Djarva filmiska avbjóðingin, at lata gerandisligar og sosialrealistiskar filmsupptøkur úr túninum møta teknifilmi, og skapa eitt nýtt flog, havi eg aldri sæð fyrr í føroyskari films- ella sjónvarpsgerð. Júst hetta lag og jaður í filminum, animatiónirnar, geva filminum eitt sereyðkenni, sum innikapslar myndaverðina hjá Sigrun.





Rógvi Rasmussen og Jón Hammer, sum við KYKmyndum man hava framleitt tað besta av føroyskum filmi, siga, at tað eru leikstjórarnir, Beinta á Torkilsheyggi og Marianna Mørkøre, sum eiga hugskotið at animera listina hjá Sigrun í brotum.



Tað er bæði fyri at livandigera listina hjá Sigruni, og fyri at taka áskoðaran við inn í hendan heimin, sum Sigrun skapar við síni list, súmbolum og blandaðu støddarforholdum.

*Tey brotini, sum eru animerað, eru knýtt at tí, sum verður sagt í filminum, men tankin var eisini at geva áskoðarunum eitt frírúm, har tey bara kunnu vera í listini og vera í upplivingini eina løtu.*

Sjálvar animatiónirnar hevur bretska Katy Beveridge gjørt. Katy hevur lisið á Central Saint Martins í London, saman við Heidi Andreasen av Eiði. Beinta, Marianna og eg hava øll trý búð í London eitt tíðarskeið, og soleiðis er alt knýtt saman, sigur Jón eftir filmsýningina á Eiði.







Eitt annað sereyðkenni við filminum er, hvussu litirnir eru valdir og settir saman, so hvør sekvensur kennist sum eitt tableau, ein myndlistarlig uppseting, í einum úrvaldum liti.

Estetiska valið førir eisini til, at tá drotningin skal hava umbidna málningin frá Sigrun, síggja vit bara umhvarvið av hennara hátign, Margrethu drotning, sum situr fremst í Kongshøll á Vestaru bryggju í Havn.

Tað er Sigrun, sum er í fokus og ljósið verður varpað á. Og so er tað tónleikurin hjá Ólavi Jákupssyni.

Alt samalt verður borið á veingjum, so hesin filmurin verður hugtakandi, sum eingin annar heimildarfilmur eg havi sæð.

Her verða allar framleiðslukreftir og filmisku listardygdir settar saman at siga søguna um Sigrun, sum í Eiðistúni er beint fram einføld, men úr ervasýni, knýti til mammuna og familjuna, og í smáu ferðunum, sum úti í heimi forloysa stórar myndir - sum grønlendska drongin, ið ikki stóð til at bjarga, og heimligu sorgina at missa svigarinnuna - setur tilveruna í perspektiv, so hvør smálutur gevur meining, okkum, sum hyggja til upplivingar, ja onkur segði signingar, so stillisliga sterkur er hjartafilmurin, ið hevur fingið vælvalda heitið Heartist, at lýsa málaran, sum málar við hjartanum.



Heartist er tann føroyski filmur, sum í filmiskum frásøgukynstri kann røkka longst út í verð.

**Heartist verður frumsýndur úti í heimi á filmstevnuni CPH:DOX sunnudagin 19. mars. Í Føroyum verður Heartist frumsýndur almenninginum í Filmsfelagnum, mikudagin 5. apríl, tá Sigrun, Beinta og Marianna fara at greiða frá og svara spurningum.**

Til lukku við filminum og takk fyri frumsýning, har Slættaratindur bleiv nekarakyss, sum vit fyrr søgdu. Eisini fekk eg mynd av høvuðspersóninum, Sigrun, framman fyri filmsplakatini.















*Mynd: Kateryna Vischchak Joensen*



# DANSIFELAGIÐ Á LÁTRINUM

## *Rasmus Joensen*

Gott kvøld øll somul.

Fyrst fari eg at takka fyrireikarunum av tiltakinum ”Skifti” fyri, at tit hava tikið stig til hettar titakið og síðani takka vit í Dansifelagnum á Látrinum fyri, at tit hava sett tíð av til okkara. Sjálvi høvdu vit ætlanir um eitt tiltak her í Kolshøll á heysti í 2021, men vegna Koronu, bleiv tað lagt til síðis, so vit eru sera takksom fyri, at kunna vera við í ár.

Eg fari at hugleiða eitt sindur um føroyskan dans - soleiðis sum eg minnist hann - á Eiði, tá eg var skúladrongur seinast í 50-unum og fyrst í 60-unum.

Nógv tað stórsta kvøldið, sum eg minnist tað, var fastalávints sunnukvøld. Børnini áttu dansistovuna frá kl. 7 til 8, tá tey vaksnu komu í dans. Eg minnist hvussu leingi tað var at bíða eftir klokkuni, til hon nærkaðist klokkan 7. Mann gekk aftur og fram uttanfyri.

Kanska ein túr oman í Korndal og so heim á Vaglið og so hugdi mann upp í dansistovuna: Mundi Edvard í Myrðmanstovu vera komin oman og hevði hann latið upp og tendrað ljósið. Tá tað so endiliga var ljós í dansistovunu, tá lætnaði og mann rann inn. Skjótt var gólvið fult av børnum, sum runnu runt og beistaðust og bíðaðu eftir, at onkur vaksin kom at hjálpa okkum við at skipa.

Tað var altíð onkur, sum kom at dansa við børnunum. Eg minnist Martin hjá Peturi og Jóhann hjá Peturi. Jákup hjá okkum og Óli hjá Anton vóru eisini. Nógv onnur komu eisini inn og uppí ringin. Tá eg var lærari her norðuri, skipaði eg eisini í fleiri ár.

Hvat vit kvóðu, minnist eg ikki so væl, men á fastalávint taldu vit jólini: Mær gav sankta Mortan og Stat op Santa Simeon. Hesar vísunar lærdu vit í dansinum á fastalávint – vit lærdu tær á gólvi.



Tað nógva av kvæðum, sum vit børn lærdu, lærdu vit í skúlanum. Mann hevði fyri at duga uttanat, og eisini skrivaði lærarin upp á talvuna og so skuldu børnini skriva av niður í eitt hefti. Tey smærru børnini brúktu dupultar reglur og tey eldu einkultar reglur. Vit fóru ikki upp á gólv í klassanum, tí skúlin – skúlastovurnar – vóru vígdar.

Vit kundu dansa í skúladurunum og eisini var nógv dansað í Skúlavíkini. Í hesum dansinum lærdu vit eisini stev. Av tí, sum var kvøðið í skúlanum minnist eg best Sigmunds kvæði yngra, Ormin langa og Hr. Sinklar.

**Var tað ódnarveður høgt við vátakava, var ikki útiverandi og mann mátti fáa øll undir tak – inn í durarnar, men ikki vóru teir stórir til øll børnini. Dururin til stórustovu, mundi hann vera 3 x 5 m, 15m2? Øll sluppu ikki inn, summi stóðu uttanfyri og trýstu, tá kundi standa so nógv á, at hurðin inn í skúlastovuna brast upp og børnini duttu inn á gólvið.**

Eg minnist ikki, um vit høvdu kvøðið Flóvin Bænadiktsson áðrenn eg fór til Havnar at ganga í realskúla í 1965. Men tá eg kom norður aftur á fastalávint í 1966, tá kvóðu tey elstu børnini Flóvin Bænadiktsson og eg dugdi ikki uppí, og tá setti eg mær fyri, at næsta ár, tá skuldi eg duga Flóvin Bænadiktsson. Eg fór at lesa og terpa og dugi hann næstu fastalávint.



Eg minnist, at tey elstu børnini einaferð høvdu lært Ólavur Riddararós, og eg haldi, at tey skipaðu sjálvi. Í realskúlanum lærdi eg meg at skipa bæði Leivur Øssursson, sum eg næstan dugdi, áðrenn eg fór til Havnar og Brestiskvæði, sum tá var nýtt fyri mær.



Onnur minni frá barna- og ungdómstíðini eru dansur høgtíðkvøld á Eiði. Annað jólakvøld, tá høvdu vit eisini ein tíma, áðrenn tey vaksnu komu. Hesi kvøldini var dansur við harmoniku og tá hon tók en steðg, vóru nøkur kvæði ella vísur tikin.

Onkur kvæði, sum eg minnist plagdu at verða tikin vóru Leivur Øssursson, Vaagen, Brókatáttur og Jákupsa skegg. Av vísum haldi eg meg minnast Stærke Tidrik, Ebbe Skammelsen og Det er i natt en vaagenat.

Eg kann minnast, at tá vísurnar vóru fyri, tá kvóðu teir høgt.
Tað var um at gera, at tekjan ikki fór omanav dansistovuni.
Men væl gingu vísurnar og kvæðini.
Tá húsini á Látrinum – Látralonin – var liðugt umvæld og Eiðis Bygdasavn hevði yvirtikið húsini, skipaði nevndin í Bygdasavinum fyri ymsum tiltøkum á Látrinum. Vit eru tá fyrst í 90-unum. M.a. varð skipað fyri kvøldum, har vit prátaðu, sungu sangir og onkuntíð hevði eg okkurt til umrøðu. M.a. hevði eg uppskrift við staðarnøvnum, sum eg hevði gjørt saman við pápa, og vit kundu tá tosa um ymisk nøvn, og komu eisini á máliskur og hendingar.

*Einaferð kom Jóhanna hjá Ellu við staðarnavna-uppskriftini hjá Pól í Jógvanstovu.*

*Nokk so fitt av fólki plagdi at møta og oftani endaðu kvøldini við, at vit fóru upp á gólv Tað bleiv meira til tað, at vit sungu minni og gjørdu meira av kvøðingini, og endin varð, at kvøðingin tók yvir.*



Síðani varð avgjørt, at vit komandi vetur skuldu royna at skipa fyri regluligum føroyskum dansi eitt kvøld um vikuna. Hettar fekk stóra undirtøku, og so skuldu vit finna eitt hóskandi kvøld. Vit eru tá mitt í 1990-unum og sjóvarp er komið í hvørt hús og mikukvøld sæst fótbóltur í sjónvarpinum, so tað kvøldið kann ikki brúkast.

Vikuskifti kundi ikki brúkast, tá tá spældi mann dystir, so valið fall á týskvøld, sum síðani hevur verið okkara fasta dansikvøld: Vit síggjast á Látrinum týskvøldið kl. 20.00.

Um vit hava heilsuna og lagnan vil tað soleiðis, so verður Dansifelagið á Látrinum 30 ár á heysti í 2025. 30 ár er long tíð og fleiri okkara kunnu spyrja: Hvar fóru árini og hvat hava vit fingið burturúr. Árini eru farin til frálíka samveru og dansurin, kvæðini og vísurnar hava givið okkum sera áhugaverd mál at tosa um og ikki minni evni at taka okkum til umhugsunar!

Tá vit byrjaðu høvdu vit uml. 20 kvæði og vísur, sum tey flestu dugdu. Tá eg hyggi ígjøgnum listan fyri veturin 2023 – 24, eru 53 kvæðir, tilsamans 2.143 ørindi á listanum. Dansifelagið á Látrinum hevur verið við til at gjørt fleiri upptøkur til Útvarpið og Sjónvarpið. Tvær barnadansistevnur hava verið hildnar her norðuri í 2010 og 2022. Í 2019 hýstu vit Landsdansistevnuni, sum vit skipaðu fyri saman við Norðstreymoyar Dansifelag. Umstøðurnar til at fyriskipa slíkar stevnur í bygdini eru góðar, og vit hava altíð fingið sera góðan stuðul frá bygdini, og tað eru vit eru sera takksom fyri, og ikki minni errin av! Sum sagt, dansa vit týskvøld á Látrinum frá fyrsta týskvøldið eftir heystferiuna og til fastalávint. Tey, sum hava verið við frá byrjan, fara at eldast, so tað hevði verið kærkomið, at fingið fleiri yngri við – yngri kreftir, ið kunnu føra felagið víðari – kunnu halda og menna dansimentanina – ein av gimsteinunum í føroyskari, norðurlendskari og europeisku mentan.



**Vit, ið hava dansað leingi, bera ein stóran mentanararv innan í okkum og vit vilja fegin lata hann víðari til eftirkomararnar, so teir kunnu taka mentanararvin til sín og føra hann víðari til komandi ættarlið.**

Tí bjóða vit áhugaðum at koma á Látrið týskvøld kl. 20. Ein møguleiki er eisini, at bjóða látrafólkunum við til tiltøk, sum verða fyriskipaði. Tað kann møguliga tykjast tungt, hjá summum, at koma á Látrið, tí tey duga so nógv, halda fólk, men leggið einki í tað. Vit bjóða øllum vælkomnum og vilja tillaga dansin eisini til tey nýggju. Vit leggja ein lista her uttanfyri, har møguleiki verður at tekna seg sum lim.



*Mynd: Kateryna Vischchak Joensen*

**Verið øll vælkomin! Tit, ið hava áhuga fyri dansinum, tosið tit saman um dans og kvøðing. Og tosið so við okkum, so vit kunnu hjálpast at, at gera eina lagaliga skrá fyri nøkur kvøld. Tað er sera umráðandi, at leggja sær í geyma, at talan er um fólkadans, har øll kunnu verða við, og har tað er neyðugt at fleiri eru við.**

Øll kunnu verða við í ringinum, men øll duga ikki eins væl at skipa, soleiðis er tað bara. Men í dansinum eru øll líka, skiparin skipar, men øll bera dansin og øll uppliva dansin, hvør á sín hátt! Byrjið við løttum kvæðum og vísum og leggið so afturat.

Vit eru fús at veita eina hjálpandi hond!

Leggið tykkum í geyma, at føroyski dansurin er ein av gimsteinunum í føroyskari, norðurlendskari
og europeiskari mentan!

Hvørja ferð, vit eru uttanlands í dansihøpi, merkja vit hvussu nógv fólk fylgja við dansinum. Tey skilja ikki orðini, men í dansinum fáa tey sera viðkomandi og spennandi upplivingar!



**Evnið fyri SKIFTI 2023 er: Mistela og hennara íblástur á Eiði.**

**Í 1997 kom ein bók út við tilfarið sum Mistela – Elizabeth Taylor – hevði skrivað. Heitið á bókini er: The Far Islands and Other Cold Places.**



Her er m.a. nokkso nógv frá hennra vitjanum í Føroyum. Sumt av hesum havi eg umsett og okkurt
fari eg at taka fram.

Heiti "Mistela" kemur av, at eiðisfólk gjørdu ikki mun á Miss og Tela (Elizabeth), men hildu at tað var eitt orð, tí lærdu tey børnini at siga Mistela. Hettar minnist eg eisini væl, at pápi plagdi at siga. Hann var føddur í 1903, mamma í 1904, so pápi var 11 ár og mamma 10 í 1914, tá Mistela kom til Eiðis.

Í brævi til vinkonu sína í Amerika, skrivar hon 15. november 1914 soleiðis:
Eg eri vorðin var við, at flestu fólkini halda at eg eiti: Mistela. Tey kenna ikki týdningin av orðinum
"miss" og leggja tað afturat navninum hjá mær. Tey halda at tað er eitt fólkanavn líkasum Margretha ella Malena. Mær dámar tað, tá eg hoyri ein flokk av børnum siga: "Her kemur Mistela".



Eg hoyri tey eldru børnini siga: ”Nú skulu tit siga pent góðan dagin við Mistelu” og tá eg gangi framvið, lyfta tey ivasom eyguni ímóti mær og siga sum við ein munn: ”Góðan dagin Mistela”.

Í sama brævi skrivar hon eisini um, tá hon fór úr Havnini norður ígjøgnum Sundalagið og kom til Eiðis og fólk tóku ímóti henni. Síðs 277.









*Mynd: Kateryna Vischchak Joensen*

Góða Helen.

Seinast eg skrivaði til tín, gróv eg í garðinum hjá Hans Kristoffur. Nú eri eg ávegis til eina fjara/fjartliggjandi bygd í Norðureysturoy. Á Eiði, har eg skal halda til fyri veturin, er bert eitt, ið hevur atdráttarmegi, tann stóra familjan hjá einum donskum skipara Kruse, sum eg havi kent í nøkur ár. Yngsta dóttir hansara Malla (Amalia), og maður hennara, vilja lata meg búgva hjá teimum í vetur.



Eg fór úr høvuðsstaðnum, Tórshavn, við einum deksbáti, ið var tungt lastaður við ferðafólki, viðføri, fragt, posti, kistum, sum teir, ið høvdu verið til lands í Íslandi, høvdu í viðføri, tríggir
seyðir, ein kúgv og ein stór tunna við bleytari sápu. Hendan lak illa og skjótt var sápan yvir alt og øll, sum vóru umborð.

Seinni fór at regna og saman við teirri bleytu sápuni, bleyv tað til ein góðan látur.Vit vóru ávegis í níggju tímar, mestu tíðina inn og út eftir firðunum, har tjúkk toka, ið fjaldi fjøllini, kom rullandi omaneftir sum fyri at forða okkum vegin. Luftin var myrk og køld, og tá eg at endanum sá Eiði langt burturi, hugsaði eg, at tað er gott, at tað eru sjey langir mánaðar, til eg aftur skal ein slíkan túr við báti.

Tey hjá Kruse vóru niðri á Hamrinum og tóku ímóti mær og hjálptu mær undan aldunum, og longur uppi vóru onnur Kruse-fólk, sum fevndu meg og fylgdu mær niðan eftir helluni. Kruse-fólk runnu oman eftir teimum smølu gøtunum og onnur komu út í dyrnar fyri at heilsa upp á meg og taka ímóti mær á gáttini hjá Mallu (Amaliu). Seinni duttu tey eisini inn á gólvið, fyri at bjóða mær vælkomnari.

**Tú minnist, sjálvandi, søguna um tær tríggjar bjarnirnar og ta lítlu gentuna. Kvisturin líkist nú heiminum (húsinum) hjá teirri lítlu bjørnini.**

Alt mítt lív hevur tað verið mær til ampa, at eg ikki havi havt borð og stólar, ið passa til mína hædd, men her fekk eg møguleikan.





Joen Magnus, sum er timburmaður, postmaður, útróðrarmaður og hevur nakað av jørð, hevur tillagað innbúgvið fyri meg. Hann tekur seks cents í løn um tíman (uml. 25 oyru). Eg gjaldi sjey, og á tann hátt hava vit fingið eitt gott samstarv okkara millum. Tað eru tveyogtjúgu kassar, stórir og smáir, í teimum báðu kømrunum á kvistinum. Sjálvt um tú aldrin hevði hildið tað møguligt, er tað gjørt, og alt er passað til tørvin hjá Little Wee Bear og mær.

Hettar eru mínir kassar – mínir til mín – og tað er sjarman. Eg eigi ketilin, sinkspannirnar, steikipannuna og kustin. Eingin hevur rætt til at fara inn á kvistin og koyra sodavatn í te-ið hjá mær og kóka tað, fyri at ”*fáa tað besta burturúr*” ella koyra sukur og muskatnøtir yvir eplini. Eingin ”*søtsúpan*” skal inn um mína gátt! Gjøgnum árini eri eg troytt av at tillaga meg til hvussu onnur fólk gera.
Nú fari eg at gera tað upp á mín egna máta.





*Nú Dansifelagið á Látrinum hevur sítt innslag, fari eg at greiða frá einum dansikvøldið, sum Mistela skipaði fyri á Viðareiði. Hettar er væl fyri 1914.*

*Hon skrivar soleiðis á síðu 184 – 188 í The Far Islands and Other Cold Places*



Mítt gestaboð

Dansiboð! Í prestagarðinum! – Dance message!
In the parsonage! Ein smádrongur fór hús úr húsi á Viðareiði. Hann gloppaði dyrnar í teimum smáu flagtaktu smáttunum og bankaði uppá. Innanfyri sótu fólkini og fingu sær sunnudagsdøgurða í roykstovuni. Ikki var neyðugt at spyrja hvat klokkan dansast skuldi; tá tað var sunnudagur, bleiv tað sjálvandi um kvøldið.
Og, fyri at siga sum er, so vóru boðini um dansin meira av formellum slagi, tí øll vistu alt um hann. Øll vistu at Drikka hevði bakað smákøkur allan seinnapartin leygardagin og hevði riggað til.

Tað var mítt gestaboð og eg, sum syrgdi fyri at dansiboðini fóru runt. Fiskiskipini vóru afturkomin undan Íslandi; teir ungu menninir, dansararnir, vóru heima aftur. Presturin og prestafrúan vóru farin til Danmarkar og eg var einsamøll eftir í fremra partinum av prestagaðinum.

Í hinum endanum búðu Drikka og Sigga. Ketturnar runnu ímillum. Eftir at eg í fleiri ár havi livað sum nomadi, var tað so vælsignað at royna rolluna sum ”húsmóðir” og sum nú, at hava eitt heilt hús fyri meg sjálva. Hetta, at kunna vera blíð við fólk, hevði ligið niðurgrivið leingi, men nú vaknaði tað aftur, - allar umstøður vóru fyri at bjóða til gestaboð. Nær fekk eg, ein ferðandi amerikanari, aftur møguleikan at bjóða ungdóminum í eini kirkjubygd til hugnaliga framførðslu.

Vanligt er at dansað verður frá september til føstulávint, hvønn sunnudag. Oftani hevur pressturin lænt tann stóra køkin til sóknarbørnini til dansistovu eitt sunnukvøld, tó við einari treyt, at tey skuldu ikki hava brennivín við.

Tað var ikki nógv hóvastak, um hvørjum eg skuldi bjóða til hesa løtuna. Øll, ið høvdu hug at dansa, vóru vælkomin. Spurningurin um musikk var eisini sera einkul.







**Alt vildi vera framborið av sterku lungunum og kraftmiklu røddunum á dansarunum sjálvum, tí hesir føroyingarnir, vandir av stormi og vandamiklum sjógvi har niðri á helluni, hava vart eitt sereyðkenni – fólkadansin, sum teir framføra við at kvøða hesar gomlu fólkavísurnar.**

Eftir fleiri dagar við stormi, hvíldi havi seg og aldurnar gliðu spakuliga um hellurnar og fótin á berginum. Hetta stilla – friðurin, var kærkomin fyri oyruni, nú tey í dagar høvdu hoyrt buldrið frá tí skúmandi havinum og hurðarnar í prestagarðinum stóðu opnar - líkasum føldu hesa stillu løtuna.



Omanfyri hin hvíta toppin á Malinsfjalli sendi fullmánin sínar frostkláru strálur um bø og haga. Inni í roykstovunu var alt til reiðar.

Vælvaskaði forhang vóru drigin fyri koyggjurnar, fiskireiðskapur og mjólkakrakkar vóru sett til síðis, og kolurnar vóru hongdar so høgt, at tey dansandi skuldu ikki renna seg í tær. Lukturin av kaffi kom um innhurðina og Drikka skar kakur niður, og Sigga setti á borðið.

**Klokkan hálvgum átta vóru allir gestirnir komnir, men einki veistluljóð hoyrdist í roykstovuni. Smáir bólkar av gentum teskaðu og fnisaðu í aðrari síðuni í roykstovuni. Í hinari sótu menninir í langari røð og guvaðu ramliga upp á pípurnar og inními̇llum søgdu teir nøkur orð.**

Menninir vóru í vanligum føroyskum klæðum: Myrkum heimaspunnum knæbuksum, hosubond undir knænum at halda hosunum, sum vóru morreyðar ella myrkagráar, teir vóru í lágum donskum skóm, sum sunnu- og halgidagar loystu húðaskógvarnar av. Heimaspunnum koti av myrkamorreyðari ull við lágum kraga. Á hvødinum hava teir reyð- ella blástríputa húgvu og um hálsin tjúkt ullint turruklæði.





Brádliga reistist ein stórur herðabreiður maður, steig út á gólvið og sang (kvæð) við harðari rødd:

*Vilja tær nú líða á,*
*meðan eg man kvøða*
*um teir ríku kongarnar,*
*sum eg vil nú umrøða.*

Við eitt vóru dansararnir á fótum og tóku hvønn annan í hendurnar og gjørdu ein ring, sum tá hann var ov stórur til rúmið, boygdi seg inn í seg sjálvan í smáum fitjum, vaggandi frá síðu til síðu frá høgru til vinstru, meðan tey sungu (kvóðu) niðurlagið:

*Grani bar gullið av heiði;*
*brá hann sínum brandi av reiði,*
*Sjúrður vann av orminum,*
*Grani bar gullið av heiði.*





Hetta var kvæði um Sjúrð, og hendan gamla støvugta roykstovan ekkóði við søguni um Sjúrð, hest hansara Grana, um Regin-smið, og hvussu hann smíðaði svørið og um ormin Favnir, sum lá omaná gullinum – søgur og kvæði, ið eru komin higar til hesar fjarskotnu oyggjar fyri fimmhundrað árum síðani. Ørindini, ið eru fýra reglur, kvæð skiparin. Fleiri kvóðu við honum og øll tóku undir við niðurlagnum.

***"Grani bar gullið av heiði". Bert fyrsti partur av fýra ella fimm íalt varð kvøðin. Hetta kvæði verður rópt Regin Smiður og er 125 ørindi [skal vera 131]. Hinir fýra partarnir siga frá Brynhild, hennara fríggjaraferðum og skilnaði ["wooing and desertion"], gifta Gurðunar, dráp Sjúrðar, hevnd Gurðunar og so víðari til tey hugdu at Artala á Gylta Fjallinum.***

Stevið var einkult. Vinstri fóturin tók eitt stig til vinstru og høgri fóturin fór aftaná, kom niðurí eitt sindur aftari. Síðani tók vinstri fóturin enn eitt stig til vinstru og høgri fór aftná. Hesi stigini vóru alt stevið. Hendurnar tóku saman og vóru havdar í bringuhædd. Tær hingu ikki stillar.

Men tá tað í kvæðinum kom til eitthvørt ógvusligt, tá livdu tær við. Tær vóru lyftar í akslahædd og syftar aftur og fram við kvikum sveiggjum. Tær fluttu seg sum tær áttu, kvøðingin og stevið móti gólvinum góvu taktina. Hvørki pausa ella steðgur var, øll 125 [131] ørindini vóru kvøðin út í eitt.

Meðan niðurlagið líðandi doyði burtur, stóðu fólkini framvegis á gólvinum haldandi hvønn annan í hondina. Tvær røddir byrjaðu nú hvør sítt kvæði, onnur eina eldri danska vísu og hin eitt grindakvæði, yrkt fyri bert 50 árum síðani.



Eina løtu var alt ein hurluvasi, summi tóku undir við einum og onnur við hinum, men grindavísan sigraði – hinar røddirnar tagnaðu.

Hvalir - grindin ella hvalarakstur, stendur hvørjum føroyingi nær at hjarta. Við kraft tóku røddirnar undir, hvør maður kvæð við makt og mæti, eyguni lýstu og kjalkarnir rodnaðu.

Gólvið skalv og alt húsið vísti seg at rystast. Kvæðið fleyt út í tað stilla mánalýsið.
Ein hoyrdi hendan slætta dagin á sjónum, hendan stilla morgunin, fiskimenninar á sjónum í sama báti.

Hvussu teir sóu grindina langt burturi, hvussu teir góvu boð frá sær inn á land og úr oyggj í oyggj. Raksturin og drápið. Menninir lyftu beinini høgt og trampaðu harðliga og drápið er av.



***Takkað verður fyri gávuna:***
***"Stor er Gud i menneske værk, han underfuldt alt monne føje:***
***skønt hvalen han gjorde så såre stærk, den skal sig for manden bøje."***
***Langt mod sønden og højt mod nord han sine velgerninger sender. Jeg ser dem på fjeld, i dal, i fjord, hvorhen jeg mit øje vender. Raske drenge, grind at dræbe, det er vor lyst.***

Nú helt eg fyri vist, at dansifólkið fór at hvíla seg, nú tey høvdu kvøðið hetta kvæði, ið er meira enn 50 ørindi [grindavísan er 58 ørindi]. Men nei, ein ung genta byrjaði spakuliga vísuna um deyða Dronning Dagmar.

*Dronning Dagmar ligger i Ribe sjug,*
*til Ringsted monne de henne vente.*
*Alle de fruer, i Dannemark ere,*
*Dem lader hun til sig hente.*
*Niðurlagið Udi Ringsted,*
*der hviler dronning Dagmar.*



Spakuliga, tungt, hendurnar hingu tungar, stillisliga var hendan vísan kvøðin. Tríggjar aðrar fylgdu eftir, áðrenn tey tóku sær ein stuttan steðg. Nú var meira lív og meira tosan. Menninir stungu sær upp í pípurnar.



Tað eru ymiskir vanar á teimum ymsu oyggjunum. Summastaðni dansa øll, bæði ung og gomul. Her á Viðareiði vóru tað bert teir ungu menninir og genturnar og tey hálvvaksnu børnini, ið tókum lut. Tó veit eg, at ein brúður kann dansa nakað eftir at hon er gift. Eisini miðaldrandi menn hava hug at luttaka viðhvørt.

Eg kann minnast, at eg havi sæð eina gráhárda kvinnu, omma, men framvegis frísk og ferug.
Hon var nakað í iva, men hevði tó verið uppií tá ein vísa varð tikin. Nú kom hon aftur og setti seg hjá mær. ”Eg eri ov gomul til hettar”, segði hon, heldur ivasom, ”mínir dansidagar eru farnir”.

Júst tá byrjaði ein skipari eina lívliga sjómansvísu, við niðurlagnum: ” Fal de rol rol, fal de rol”. Omman leyp á føtur allir hennara fordómar vóru kveistraðir til viks, eyguni lýstu: ”Farvæl, eg má fara, eg haldi ikki longri”, segði hon, og eina løtu seinni sá eg hana í ringinum eins lætta og tey yngstu.

Hettar eru so hugleiðingarnar í kvøld. Vónandi fingu tit okkurt burturúr. Nú fara vit upp á gólv aftur.
Vit taka: Ormurin langi (1-29), Stolt Signhild, Her nógv er at gera og Nú gerast kvøldini. Gerið so væl og komið út á gólvið.



*Rasmus Joensen, Dansifelagið á Látrinum*

*30. januar 1916 skrivar Elizabeth Taylor bræv til Helen, ið er á síðu 283 í The Far Islands and Other Cold Places*

Góða Helen, Januar 30, 1916

I einum brævi úr Amerika sigur avsendarin, at hon hugsar um meg sum ”ein
droymandi, ið liggur og nýtir friðfullar dagar burtur frá øllum ófriði”. Eg fari nú at
siga tær frá ”mínum friðarligu døgum”.

Um miðdagin vistu vit, at stormur var á veg, tí havið østi seg og rivini (fjøran) stunaðu (stynjaðu) og vaksandi vindurin kom ílandi, so man kundi ímynda sær at hetta kundi volda trupulleikar. Tíðliga gjørdist myrkt og um fýratíðina var ódnin yvir okkum. Húsið skalv og rystist og arbeiddi sum eitt skip á havinum.

Mígandi áarføri og sjórok feyk húsana millum og boraði seg inn í hvørja rivu og sprekku, ið vendi norðureftir – upp í ættina. Í teimum smáu skápunum undir vaðingini grulvaðu Josefina og eg á øllum fýra við lyktum og leitaðu eftir ymsum, meðan Omma kom við klútum og tvøgum, spannum og baljum. Á Kvistinum, sum bert hevði eitt tunt Zinktak, dupultar veggir, var larmurin so øðiligur, at vit máttu rópa okkara millum, um vit skuldu hoyra hvønn annan.



Tá tær harðastu hvirlurnar komu, kendist tað, sum um okkurt var galið við tyngdarkraftini. Tað var sera ørkimlandi at missa skil á, hvat, ið vendi upp og hvat, ið vendi niður og hugsa sær, at Kvisturin kundi fúka avsta, sum ein pakki við spælikortum.

Ah, tann nátt hettar var, vit hildu, at taki fór av og húsið beiv tikið av grundini og hvat skuldi Malla so gjørt? Tí í hesum ræðuliga ódnarveðrinum føddi Malla son sín Óla.

Eg helt honum í føvninginum, fimm minuttir gamal – hann var bláur og kaldur – og eg royndi at balla hann í einum heitum skjúrti, meðan vindeyguni bognaðu í vindinum og gardinurnar flakraðu í tí ísakalda trekkinum. Oh, stakkalin – at koma í heimin eina slíka nátt.

Frá tíð til aðra geri eg royndir, at fáa mær eitt pass, men einki kemur burturúr. Eg eri í rættardøminum í Keypmannahavn, men við hesum trupla hjartanum, er hin langa og vandafulla ferðin til Danmarkar ómøgulig. Eg hevði váða at fari ta styttru til
Skotland, um eg kundi fingið eitt pass.

Eg skrivaði og greiddi væl frá, hvar eg var stødd og at eg kundi ikki møta persónliga, og sendi teimum váttan við fulltrúum. At senda eitt slíkt vónríkt og heimføðisligt bræv – so vís í, at onkunstaðni í lógini mátti okkurt kunna gerast fyri ein í familjunu hjá Uncle Sam, sum var strandaður í so fjarløgdum landi. Nøkur orð, sum svar frá einum skrivstovufólki, sigur bert, at pass verða bert latin við pesónligari umsókn. So eg má verða verandi á mínum lofti.

*Rasmus Joensen*

**Borgaraverkstova**

Kom við á verkstovu!

Sum partur av tiltakinum ”Skifti 2023 – Mistela og hennara íblástur á Eiði”, verður verkstova hildin. Vilt tú verða við til at mynda títt nærumhvørvið? Kom við og sig tína hugsan.

Vit fara at práta, hava hugarok, drekka kaffi og eta kaku. Ongin fyrireiking er neyðug. Vit fara at tosa um; Heystfagnaðin, trivnað, frítíðarítriv og integrasjón.

Verkstovan verður í Kolshøll, tann 18. november kl 10:00 til 12:00.

Ynski er at 20 fólk búsitandi í Eiðis kommunu luttaka!

*Jóannes Norðberg Egilstrøð*

## Borgaraverkstova

### Við Jóannes Norðberg Egilstrøð

Tiltakið; Skifti 2023. Hesuferð var borgaraverkstova sett á skrá. Her luttóku 12 borgarar í Eiðis kommunu, harumframt 4 álitsfólk sum umboðaðu evnini á skrá. Borgaraverkstovan tók støði í fólksligri upplýsing. Upplýsingin skal koma frá vanligum fólki, sum hava forvitni fyri trivnaði og sínum samborgarum.
Verkstovan var lýst alment, og allir borgarir í Eiðis Kommunu høvdu møguleika at verða við. Karmurin fyri verkstovuna var í gongin við Kolshøll. Har var prýtt við antik møblum, seymaðum klæðum, málaríum og leirilisti o.ø.

Hvørt av teimum 4 álitsfólkum vóru sitandi við sínum borði, og tóku ímóti bólkum av borgarum á skift. Hvørt borð umboðaði eitt ávíst evni. Hesuferð vóru hesi 4 evni á skrá:

*1.Hvat fær fólk at trívast í kommununi?*
*2.Hvat hugsa tey lokalu um heystfangaðin?*
*Hvat hevði fingið borgarin at taka størri lut í fyrireikingini?*
*3.Hvat fær fólk at velja frítíðartilboð til - ella kanska frá?*
*4.Hvat hugsa fólk um integrasjón?*
*Hvør hevur ábyrgd av hesum?*

Borgaraverkstovan skal verða eitt jaligt umhvørvi, har vit deila upplivingar, meiningar og hugskot. Tí vóru leiðireglar fyri kjakið settar, soleiðis at meiningar og hugskot kundu mennast.

Upplýsingin skal koma frá vanligum fólki, sum hava forvitni fyri trivnaði og sínum samborgarum.

Verkstovan var lýst alment, og allir borgarir í Eiðis Kommunu høvdu møguleika at verða við. Karmurin fyri verkstovuna var í gongin við Kolshøll. Har var prýtt við antik møblum, seymaðum klæðum, málaríum og leirilisti o.ø.

***Niðurstøður:***

***Álitsfólk sum umboðaðu evnini, søgdu seg kunna brúka niðurstøðurnar og hugskotini frá borgarum til ítøkiligt víðari arbeiði.***

***Allir luttakarar og álitsfólk løgdu væl at tiltakinum.***

***Øll søgdu seg síggjia verkstovuna sum eitt jaliga, meiningsgevandi uppliving.***

***Luttakarar nevndu at tað var upplagt at eisini brúka borgaraverkstovu, at lyfta/lýsa trivnaðarlig og politisk evnir framyvir.***

***Allir luttakarir søgdu at tað kendist tað gott at hittast, og tosa um evnir sum hevur týdning fyri tey.***



**Víðari arbeiði**

Niðurstøðurnar verða lýstar á einum samandrátti. Hugskot og tørvir verða borin víðari til evt. Nevndir og álitsfólk. Útlit er til, at álitsfólk aftur halda meiri fokuseraðar borgaraverkstovur í næstum.

Joannes Norðberg Egilstrøð



# STJØRNULØTUR - KÆRLEIKIN GLOYMIR EI

## *Marjun Wolles*

Tá eg fyri 7 árum síðani setti mær fyri at geva eina fløgu út, serliga ætlað fólki við demens, hevði eg ikki væntað, at tað fór at taka mær so langa tíð at geva hana út. Ein ung og sera góðtrúgvin Marjun helt, at tað fór einans at taka tríggjar mánaðir, men so varð ikki. Eitt kent orðatak sigur "leingi er tað, ið væl skal vera", og soleiðis var í hesum føri.

Hugskotið til fløguna kom í 2016, eftir at eg hevði verið heima í Føroyum og arbeitt á einum ellisheimi í summarfrítíðini. Eg las tá Jazz sang í FÍH í Reykjavík, sum er ein kendur tónleikaskúli í Íslandi, so mær dámdi væl at syngja saman við búfólkunum, meðan eg var til arbeiðis.

Tað var skjótt, at eg legði til merkis, hvussu nógvan mun tónleikur gjørdi í gerandisdegnum. Eisini legði eg til merkis, at búfólkini stundum gjørdust ørkymlað og órólig av tónleikinum í útvarpinum, tá tað hendi ov nógv í tónleikinum. Tí var tað, eg hugsaði, at tað hevði verið gott við eini fløgu við kendum føroyskum sangum, ið ikki høvdu ov nógv ljóðførum, sum spældu samstundis. Eisini var tankin at hava ljóðføri, ið vóru nógv brúkt, kanska serliga í gomlum døgum, sum t.d. klaver, orgul, harmoniku og klokkuspæl.

Nøkur ár seinni, tá eg skrivaði bacheloruppgávuna á Listaháskóla Íslands, valdi eg at skriva um tónleik og heilan. Eg haldi tað verða sera áhugavert, hvussu tónleikurin er goymdur í øllum pørtum í heilanum.

Tí ber til at brúka tónleik sum eitt arbeiðstól, tá tað kemur til at arbeiða við fólki, ið hava heilaskaða, eru dement, hava parkinson ella arbeiða við børnum við autismu.

Tónleikur hevur sera nógv at siga fyri tað føroyska samfelagið, men eg haldi ikki, vit geva okkum far um, hvussu stóra ávirkan tónleikurin hevur á okkum sum menniskju. Fyri meg persónliga hevur tað altíð verið sera hugnaligt at sungið saman við familjuni, sungið morgunsang í skúlanum ella løturnar tá tónleikurin steðgar á møtum, og ein hoyrir fjøld av fólki syngja, summi byrja enntá at syngja fleirraddað. Hesar løturnar hava fyri meg verið nakrar av teimum hugnaligastu, sum eg minnist aftur á.

Eg vóni við hesi fløgu at skapa ein pall, har fortíð og nútíð møtast, og har familjur kunnu skapa nýgg minni við sínum kæru. Fløgan er hugsað sum ein “Syngið við” fløga, tí er húsin ein bók við sangteksti, nótum og akkordum, soleiðis at tað skal verða lætt at syngja og spæla við.

Eg vóni, at fløgan verður mongum til ugga og gleði.

*Heilsan*
*Marjun Wolles*



# EIÐS LJÓMFELAG

## KÁRI SÓLSTEIN



Til hátíðarhaldið Eiðis Ljómfelag 100 ár segði Kári Sólstein soleiðis;

Fyrsta hornblástrarfelaga á Eiði varð stovnað í 1920, tá fyrstu hornini vórðu keypt - 2 trompetir, 2 althorn, 1 tenorhorn, 1 Es-tuba, 1 lítla trumma og 1 klokkuspæl. Eftir øllum at døma hava tíðarskeið verið við lítlum og ongum hornblástri; men undir Seinna heimsbardaga kom lív í aftur og eftir kríggið fóru menn burtur, so tá bar einki til við hornum.

22. januar 1967 varð Eiðs Ljómfelag endurstovnað. Orkestrið var rættuliga virkið hesa tíðina og styttri tíðarskeið uppundir hornorkesturstevnuna hevði Eiðis Ljómfelag í fleiri ár útlendskan venjara á vitjan: Gert Rasmussen, hornblásari í Sønderjyllands Symfoniorkestri. Bróður hansara, Svend Rasmussen, var venjari hjá Fuglafjarðar hornorkestri. Aftan á eini 10 ár í dvala, var tann 27. apríl í 1991 aftur ein roynd gjørd fyri at fáa lív í Eiðis Ljómfelag.

***Fyrr var orkestrið eitt reint Brass Band, men nú eru eisini træblásarar við, so talan er nú um eitt harmoniorkestur.***



# Málningur úr Herning og ynski um savn

Til tiltakið í 2022 handaði Ellindur Egilstrøð, Rógva Egilstoft borgarstjóra ein málning, ið Óli Egilstrøð hevur málað og sum Norrøna Felagið í Herning hevur fingið sum gávu frá Norrøna Felagnum á Eiði. Ynski var frá Norrøna Felagnum í Herning, at málningurin kom aftur til Eiðis og kom at hanga á einum savnið við málningum hjá Óla Egilstrøð.





## Heilsan frá Birgir Kruse til Annsy Høghamar, borgarstjóra

### Birgir Kruse

Til tiltakið í 2023 hevði Birgir Kruse hesa heilsan, ið hann hevði borið fram til Annsy Høghamar, borgarstjóra.

*Hey Annsy,*

*Takk fyri síðst, tá vit hugdu eftir filminum "Heartist" um Sigruna Gunnarsdóttir í Kolshøll herfyri, og fyri tíni góðu inngangsorð.*

*Fríggjamorgnar fáa vit okkum kaffi í Undirvísingarstýrinum og Námi, har eg arbeiði. Tá er altíð okkurt kjakevni á skránni.*

*Næstsíðsta fríggjadag helt onkur, sum hevði sæð "Heartist", at eftir henda filmin og umrøðuna av Niels Kruse (1871-1953), burdi ein standmynd verið reist á Eiði av Føroya fyrsta listamálara.*

*Ein standmynd, sum kundi verið savnandi sum minnismerki á einum hóskandi stað, til dømis niðri í Múlavík, ella við Kruse-handilin, neystini niðri á Hamri, við húsini, har hann búði, ella kanska har, hann doyði.*

*Møguleikarnir fyri staðseting eru mangir. Hvussu er og ikki, so lovaði eg vegna kaffigestirnar henda morgunin, at bera boðini víðari til Eiðis kommunu.*

*Tað verður hervið gjørt.*

*Vinaliga*

*Birgir Kruse*
*Tórsbyrgi 18*
*100 Tórshavn*



# UPPSKOT FRÁ JÓGVAN K. MØRKØRE UM MENTANARHÚS Á VAGLINUM Á EIÐI

## MENTUNARHÚS Á EIÐI

### Eitt hús til list og listahandverk v.m., skapt av fólki í Eiðis kommunu.

Mentunarhúsið skal ikki vera soleiðis sum vit vanliga kenna bygdarhús (vinnuligur dámur), men eitt stað har roynt verður at skapa hátíðardám um tað list og listahandverk v.m., sum fólk í Eiðis kommunu hava skapt og sum hetta hús skal elva til, fer at verða skapt.

Húsið fer at kunna hýsa ymiskum gestaframsýningum og eisini fer at bera til at hava smærri strúkikonsertir og líknandi tiltøk.

Ein týdningarmikil ætlan við húsinum er eisini tann, at bygdafólkið skal eiga nakað ið tey av røttum kunnu vera errin av og við gleði sýna gestum og vitjandi, sum har fáa innlit í tað ið bygdafólkið stendur fyri.

Kommunan átekur sær røkt og rakstur av húsinum, eisini um húsið verður sjálvognarstovnur.

Listarverk v.m. at byrja við:

1. 20 málningar av Niels Kruse.
2. 25 málningar av av Óla Egilstrøð.
3. 10 málningar av Sigrun G. Niclasen.
4. Glaslist frá glasverkstaðnum hjá Lisu Ellingsgård.
5. Handarbeiðir frá vevskúlanum á Eiði.
6. Príðislutir úr stórhvalatonnum.
7. Modelskip.
8. Fotomyndir hjá Ásmundi Poulsen.
9. Modell av Eiðis bygd 1900 – 1925, støðd 1:35, heruppi í myndir og ættartalvur.
10. Sveinastykki hjá ungum fólki í kommununi, framsýnt í húsinum, hevði uttan iva verið eggjandi.
11. Konserveraðar plantur og fuglar, eisini ymisk steinasløg, sum saman kunnu lýsa náttúrgivnu umstøðurnar í kommununi.

Fyri at tryggja ávíst góðskustøði, er metingarnevnd sjálvsøgd.

**Bygdaráðið fór undir at ogna sær hús á økinum, sum so endaði við at økið bleiv hóskandi til mentunarhúsið og staðfest í byggisamtyktini. Uppskots-tekning bleiv gjørd, sjálvur gjørdi eg modell av mentunarhúsinum og miðøkinum í bygdini. Áftaná samtykt keypti eg fyri o.u. kr. 1.500- í tilfari – sum er kostnaðurin fyri modellið**

**Bókførdar bygdaráðssamtyktir mentunarhúsinum viðvíkjandi:**
**14/01-92 Bygginevnd til menturnarhús**
**01/10-94 100 ára dagur fyri Eiðis Kommunu, samtykt at seta av Kr. 1.000.000,- til byggjan av mentunarhúsi**
**27/11-95 Kr. 1.000.000, - til mentunarhús**
**14/01-98 Bygginevndin keypa undirlendið, Krusahjallinum**
**19/10-98 bygginevnd til bygdaráðs/menturnarhús**
**18/01-99 bygginevndin bjóða út arbeiði at endurreisa Krusahjall**
**Aug 2007 sjálvognarstovnur til bygdaráðs/menturnarhús**


VÆLKOMIN
TIL
EIDIS



# MÍN ÍBLÁSTUR
# ELLINDUR EGILSTRØÐ



Tá íblástur er ein reyður tráður í øllum tiltakinum, er tað ikki so løgi, at fólk eisini vildu hoyra um mín íblástur til mínar málningar og um heitini á málningunum.

Á ein hátt er alt í myndunum frá mínum bárnaárum á Eiði. Ein danskur listamaður segði einaferð við meg, at tað er týðuligt at tað, ið er í tínum málningum, er nakað, ið liggur djúpt í tínum DNA. Og helst er tað nakað um tað.Eg minnist týðuliga hesar løturnar frá mínum bárnaárum. Sunnudag, ella tá ein fríløta var, fóru vit í hagan. Skjótt var at finna ein áarløk, sum vit børnini kunnu spæla í.

Hetta vóru serligar løtur og ein heilt serligur heimur at traðka inn í. Áin tutlar sítt vakra lag og hennara tutl broytist, alt eftir hvat er í ánni, ella um vit leggja steinar og bøkkar fyri, ið gera hylin størri. Náttúran angar av haga, og við eitt er eitt bál kynt, so ein ketil kann setast útá. Roykurin frá eldinum blandar seg við angan frá náttúruni og er nakað sermerkt. Ein heilt nýggjur angi. Ketililin gevur eitt serligt ljóð frá sær, ið boðar frá, at nú kókar. Brádliga angar av kaffi og tað er tekin um, at eitthvørt gott verður at fáa. Alt smakkaði øðrvísini úti í haganum. Ljóðmyndin í náttúruni er kveikjandi. Á ein hátt er kvirt, men hendan kvirran gevur ljóðunum frá fugli, seyði, neytum og fólki serligt rúm.

Hetta vóru serligar løtur, og mest hugtakandi var at eygleiða hesi áhugaverdu landsløgini, ið vóru her rundan um áarløkin við fjøllum, dølum, fossum, drangum, gilum og gjáum, og her eru fleiri holur í landslagnum, ið til ber at fara á longri ransóknarferðir inn í tað ókenda. Landslagið broytist nógv, alt eftir hvar tað verður eygleitt frá. Tað hevur ikki nakran avgerandi týdning, hvar hetta landslagið er, ella hvat ymisku fjøllini, dalarnir, drangarnir og sundini eita, ella júst hvar vit vóru, tá vit eygleiddu tað. Tað er okkara upplivilsi og okkara leikur, ið er tað avgerandi.

***Tað eru hesi smáu landsløgini eg teknaði tá eg var heima við hús, og eg minnist, at um pápi kom framvið, steðgaði hann á og hevði onkrar viðmerkingar um tekningarnar og legði lag á. Eg minnist eisini løturnar, tá pápi stóð frammanfyri vindeyganum og eggleiddi skiftandi ljósið og hann rópti á okkum um at koma og síggja hesi mongu ljósskiftið.***

Løturnar tá pápi stóð og málaði vóru heilt serligar. Hesin angin av oljumálingini og at síggja hvussu hesi landsløg brádliga vóru til á løritinum, drógu meg inn í málningin og eg fór á mínu egnu ferð inn í málningar hansara. Hetta vóru mínar upplivingar og bert mínar og tað var enn meira áhugavert hvat var handan fjøllini, dalarnar og sundini. Í mínum hugaheimi, vóru tað altíð fjøll, dalar og sund, ið eg ikki hevði upplivað enn. Tað, ið var handan mjørkan var enn meira áhugavert.

Soleiðis er tað eisini í mínum málningum. Tað er óiva enn fleiri fjøll handan mjørkan og alt eftir hvat ljós kemur á málningin broytist hann nógv og vónandi koma nýggj landsløg og nýggjar upplivingar fram. Óivað er tað nógv ymiskt eygleiðarin ikki hevur varnast í málninginum enn, men tað kemur so við og við.

Hesar ferðir inn í tað ókenda landslagið, eru eins nógv ransóknarferðir inn í meg sjálvan og mítt egna sinn.



*Mynd Kateryna Vischchak Joensen*



*Mynd Kateryna Vischchak Joensen*

**”Men tá tað eru landsløg úr føroysku náttúruni gevur tað so meining at mangir av titlunum á málningunum eru á enskum, sum Norwegian wood, Let me die in my footsteps, 4th Time Around, Before the Flood v.m.”?**

Eg var bert ein lítil drongur tá eg lá á stovugólvinum, í húsuinum har eg varð føddur og uppvoksin, og lurtaði eftir einum sangi ið spældi í hátalaranum.

Eg varð djúpt gripin av hesari gandakendu løtu og alt varð miðsavna júst um hendan sangin. Tað var sum um, at hann ið sang, tók í hondina á mær og fortaldi mær eina søgu, ið bleiv verandi millum okkum báðar. Hann bjóðaði mær við á eina ferð, langt, langt burtur.

Samanspæli millum gittaran, munnharpuna og rødd hansara, var bergtakandi. Hóast eg var blaðungur, visti eg gott at hann ið sang var staddur langt vekk frá Føroyum og at eg ikki kom at møta honum her heima.

Sum sagt var eg lítil og eg skilti ikki eitt einasta orð á enskum. Men tað hevði ikki gjørt mun um hann hevði sungið á føroyskum, mínum móðurmálið. Eg hevði neyvan skilt orðini hóast tað. Eg fekk gásarhold. Kroppurin kendis tyngdarleysur, og tað var, eins at eg sveimaði í rúminum. Hetta var fyrstu ferð, at eg varð tilvitaður um, at eg kundi fáa so sterkar kenslur. Kroppurin varð bleytur og léttur, og eg sveimaði á einum ljósareyðum skýggji.



*Mynd Kateryna Vischchak Joensen*

***Knappliga føldi eg móttloysi, sakn, og enntá ræðslu. Alt í somu stund. Eg merkti týðiliga at sangur hansara var álvarsamur. At lívið har úti eisini kundi verða ótolandi, harðrent og órættvíst. Hetta varð eisini fyrstu fer at eg varð tilvitaður um at tónleikurin kundi kveikja hesar kenslurnar í mær. Tónleikurin, tirraði fram ein film í høvdinum á mær, sum ongin fyrr hevði sæð.***

Knappliga føldi eg móttloysi, sakn, og enntá ræðslu. Alt í somu stund. Eg merkti týðiliga at sangur hansara var álvarsamur. At lívið har úti eisini kundi verða ótolandi, harðrent og órættvíst. Hetta varð eisini fyrstu fer at eg varð tilvitaður um at tónleikurin kundi kveikja hesar kenslurnar í mær. Tónleikurin, tirraði fram ein film í høvdinum á mær, sum ongin fyrr hevði sæð.

Eg bleiv sogin inn í eitt ævintýr og tikin við á eina ferð. Og Ferðin varð long.

Søgurnar, ið vórðu sagdar í sanginum sum eg hoyrdi sum barn, og teir mongu sangirnir ið eg havi hoyrt ígjøgnum árini eftir hetta, eru eisini ímillum tey mongu løgini av máling í hvørjum einasta málningi. Júst hvussu og júst hvussu ein sangtittul ella brot úr einum sangi endar sum heitið á einum málningi er bæði ein longri søga og møguliga ein søga, ið eingin veruliga kann greiða frá og hyggjarin má á sína egnu ferð inn í málningin.og uppliva hetta.

Góða ferð inn í málningarnar.

Ellindur




*Mynd Kateryna Vischchak Joensen*

# JAN EGIL KRISTIANSEN










*Mynd Kateryna Vischchak Joensen*









*Myndir frá Kateryna Vischchak Joensen*

## LUTTAKARAR

**Myndir;** Kateryna Vischchak Joensen, Birgir Kruse, Jógvan K. Mørkøre, Anna Sofía Egilstrøð, Jan Egil Kristiansen, og Ellindur Egilstrøð.

**Tekstir;** Rasmus Joensen, Birgir Kruse, Lis E. Mortensen, Ansy Høghamar, Kári Sólstein, Alda Magnusardóttir Egilstrøð, Jóannes Norðberg Egilstrøð, Jógvan K. Mørkøre og Ellindur Egilstrøð.

**Tekstir til eidistiltok.fo;** Martin K. Kristiansen

**Framførðslur;** Eiðis Ljómfelag, Dansifelagið á Látrinum, Børn úr Eiðis skúla, Marjun Wolles, Anna Katrin Øssursdóttir Egilstrøð, Annsy Høghamar, Lis E. Mortensen og Rasmus Joensen.

**Búnar, leir, installatión;** Anna Sofía Egilstrøð

**Installatión og myndafrásøgn;** Jan Egil Kristiansen

**Filmur;** Heartist um Sigrun Gunnarsdóttir

**Elizabeth Taylor Epoke og myndafrásøgn;** Ellindur Egilstrøð

**Málningar;** Sigrun Gunnarsdóttir og Ellindur Egilstrøð

**Borgaraverkstova;** Jóannes Norðberg Egilstrøð

**Uppseting;** Andrea Silvaiová

**Hjálp;** Eydna Egilstrøð, Jan Egil Kristiansen, Nikkel Nielsen, Sjúrður Vesturdal Nielsen og Eyðun Egilstrøð

**Fyriskiparar av tiltakinum;** Anna Sofía Egilstrøð og Ellindur Egilstrøð

**Stuðlar**

*Almanna- og mentamálaráðið*
*Smyril Line*
*Kolshøll*
*Eiðistiltøk*
*Gamla Hotellið í Miðvági*



*Myndir frá Kateryna Vischchak Joensen*